FYLGISKJAL 9

LM-028/2022

Jákup Andrias Kristiansen

Fra: Rúna Fossdal Guttesen
Sendt: 12. juli 2022 13:57
Til: Jákup Andrias Kristiansen; Journalin hjá LMS
Emne: SV: TIL UMMÆLIS: Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í sambandi við dagføring av konkurslógini fyri Føroyar

Taks hevur ongar viðmerkingar til uppskotið.

Vinarliga

Rúna F. Guttesen
ráðgevi
tel. 352743

TAKS
Postrúm 2151, 110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni
Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.

Notice
Please notify me and delete this e-mail and its contents if you are not the intended recipient of this e-mail.

Fra: Jákup Andrias Kristiansen <JakupA@tinganes.fo>
Sendt: 24. juni 2022 14:58
Til: Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Fjarskiftiseftirlitið <fjarskiftiseftirlitid@fjarskiftiseftirlitid.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; bst@postur.fo; fafelag@fafelag.fo; info@fiskimannafelag.fo; fhf@fhf.fo; Marius Thomassen <marius@industry.fo>; post@journalist.fo; prentarafelag@gmail.com; Jórun Gardar <jorun@industry.fo>; Niels Winther <niels@industry.fo>; betri@betri.fo; Mortan Simonsen <mortan@industry.fo>; hak@hak.fo; haf@haf.fo; kl-arbkv@olivant.fo; kamf@olivant.fo; kaf@kaf.fo; lfh@lfh.fo; Landsverk <lv@lv.fo>; mu@mu.fo; starvsfelag@starvsfelag.fo; ytf@ytf.fo; stefan@industry.fo; kf@kf.fo; setur@setur.fo; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; industry@industry.fo; johannus@mo.fo; jh@jfk.fo; petersen@adv.fo; Rættarhjálp Føroya <post@raettarhjalpin.fo>; 'Post Sorinskrivarin' <post@sorinskrivarin.fo>; ro@fo.stm.dk; politi@politi.fo; absalon@mail.fo
Emne: TIL UMMÆLIS: Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í sambandi við dagføring av konkurslógini fyri Føroyar

Til ummælispartarnar

Viðfest verður sent tykkum:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í sambandi við dagføring av konkurslógini fyri Føroyar (Gjaldsteðgur og neyðskuldarsemja verður broytt til endurskipan, reglur um trotabúsbann verða settar inn í grannskoðaralógina), og
- javntekstur.

Um uppskotið

Løgtingið hevur í mars 2022 samtykt uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse ændringer i konkursloven m.v. Broytingarnar, sum koma í gildi tann 1. januar 2023, snúgva seg í høvuðsheitum um at seta reglur um endurskipan/*rekonstruktion* og trotabúsbann/*konkurskarantæne* inn í konkurslógina.

Reglurnar um trotabúsbann koma ístaðin fyri reglur um gjaldsteðg, neyðskuldarsemju o.a., sum við áður nevndu anordning verða settar úr gildi. Reglurnar verða ístaðin savnaðar í eitt nýtt, felags regluverk um endurskipan. Neyðugt er tí at rætta tilvísingar til hesar reglurnar í einari røð av løgtingslógum o.tíl.

Neyðugt er eisini at gera tillagingar í grannskoðaralógini, soleiðis at hon leggur upp fyri nýggju reglunum um trotabúsbann.

Fylgibroytingar skulu eisini gerast í kongligum fyriskipanum og í fólkatingslógum, men hetta lógaruppskotið fevnir bara um fylgibroytingar innan sermál - á yvirtiknum málsøkjum. Fylgibroytingar innan felags mál verða gjørdar av danska løgmálaráðnum.

Uppskotið er sent beinleiðis til:

Stjórnarráðini, TAKS, Gjaldstovuna, Vinnustovnin, Landsverk, Dátueftirlitið, Føroya Rætt, Advokatfelag Føroya. Rættarhjálpina, Ríkisumboðið, Fútan, Føroya Politistafelag, Føroya Kærustovn, Fróðskaparsetur Føroya, Vinnuhúsið, Kommunufelagið, Brúkaraumboðið, Búnaðarstovuna, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Fiskimannafelagið, Føroya Handverkarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroysk Miðlafólk. Føroya Prentarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Reiðarafelagið, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Handilsvinnufelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Landsfelag Handverkaranna, Meginfelag Útróðrarmanna, Ráðgevarafelagið, Reiðarafelagið fyri Handilsskip, Starvsfelagið og Yrkisfelagið Trygdin.

Uppskotið er harafturat lagt út á almenna ummælisportalin hjá Føroya landsstýri.

Freistin at senda Løgmansskrivstovuni viðmerkingar er fríggjadagin 15. august 2022.

Vinaliga / Kind regards

Jákup Andrias Kristiansen
Fulltrúi / Adviser
Lógartænastan / Legal Service
Mobile: +298 257013
jakupa@tinganes.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

LØGMANSSKRIVSTOVAN
The Prime Minister's Office
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 306000 / lms@lms.fo / www.lms.fo